## Át tummilfingur

Ein 18 ára gamal maður varð í dag í rættinum í Frederiksberg dømdur hálvt annað árs fongsul fyri at hava høgt tummilfingurin av einari ungari kvinnu og etið hann. Dómurin í dag er bert ein lítil partur av einari umfatandi sak um ringu viðferðina av einari táverandi 19 ára gomlu gentu. Hon var millum annað hildin fangi í einum skúri í Suðurhavnini í Keypmannahavn. Tað eydnaðist henni kortini at flýggja og boða frá, og síðani er málið útgreinað av løgregluni. Unnustin hjá gentuni noyddi ein vinmann at verða við í ringu viðferðini av gentuni, og noyddi hann at høgga tummilfingurin av gentuni og síðani eta hann. Og tað er vinmaðurin so nú dømdur fyri. Verjin hevur kravt, at dómurin skal falla burtur, tí maðurin handlaði undir tvingsli. Unnustin hjá kvinnuni situr varðhaldsfongslaður og er sagdur sinnissjúkur. Hann skal fyri rættin í november, skrivar ekstrabladet.dk.



*Tað var í hesum skúrinum, at 19 ára gamla gentan var hildin fangi*

# Ákærurnar vóru

**Tá Rafik Bourbia og bróður hansara 31. juli vórðu dømdir fyri drápshóttan móti systir- og bróðursynum teirra, vóru ákærirnar bygdar á lygnir. Tað sigur annar teirra, sum meldaði Rafik og bróðurin til løgregluna**




RÆTTARMÁL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Muhammed Bourbia skrykkir nú teppið undan ákæruvaldinum í málinum móti Rafik Bourbia og bróðuri hansara um drápshóttan móti Muhammed og einum systkinabarni hansara.

- Tá Tallell fyri stuttum viðgekk fyri mær, at alt, hann hevði sagt mær um hóttanir frá Rafik var nakað, hann hevði funnið upp á, gjørdi eg av at koma aftur til Føroya, sigur Muhammed Bourbia.

Tallell hevur rikið Rafiksa seinastu árini, og hevur havt bæði innkeyp og handfaring av pengum um hendi. Í rættinum kom fram, at tað kom ikki nóg nógvur peningur í kassan, hóast sølan kundi verða upp í fleiri og tjúgu túsund um dagin. Í dag sigur Rafik seg hava funnið út av hví.

- Tað vísti seg, at eingir kontantir pengar komu á kontoina í bankanum. Bert sølan, sum fór fram við korti, kom á konto, sigur Rafik Bourbia.

Tað hevur seinni víst seg, sambært samstemmandi frágreiðingum frá teimum báðum, Rafik og Muhammed Bourbia, at stóri skurkurin í málinum er Tallell, sum hevur tikið kontanta peningin, veksla hann um til danskar seðlar og síðani sent teir við posti til Tunesia.

- Eg havi spurt meg fyri í bankanum, um reiður peningur varð settur inn, og á posthúsinum um brøv, og eg kann bara staðfesta, at eingin reiður peningur er settur inn á kontoina í langa tíð, og at peningur er vekslaður um úr føroyskum til danskar seðlar, sigur Rafik Bourbia.

Somuleiðis váttar heim aftur komni Muhammed Bourbia, at hann hevur sæð Tallell við nógvum pengum í tasku síni her heima í Føroyum.

### Altíð hjálpt mær

Sambært Muhammed Bourbia, eru allar ákærur móti Rafik Bourbia settar fram eftir at Tallell hevði bilt honum inn, at Rafik skuldi havt sagt tað, sum hann er dømdur fyri at siga.

Rafik Bourbia hevði illgruna til, at alt ruggaði ikki rætt við pengunum, og tí halda teir báðir, at Tallell hevur kent seg kroystan av avdúking, og at tað kann vera atvoldin til, at hann hevur sagt Muhammed Bourbia um hetta við hóttanum frá Rafik.

Muhammed Bourbia sigur, at hesar hóttanir ikki eru settar fram, meðan hann hevur hoyrt, og alt hann veit um tær er tað, sum systkinabarnið hevur sagt honum.

-Tá hann ringdi um morgunin og segði, at Rafik ætlaði at drepa okkum, gjørdist eg ræðuliga bangin. Eg skilti ikki hví, men eg trúði honum, og tá hann so rann avstað úr pizzarianum og bað meg koma við, so fór eg, sigur Muhammed Bourbia.

Í rættinum kom eisini fram, at bróður Rafik hevði sæð teir báðar, Muhammed og Tallell í Kastrup, har teir høvdu spurt um veksling av pengum. Sambært Muhammed Bourbia veit hann einki um tað, og sigur tað má tískil hava verið Tallell, sum hevur havt pengarnar og spurt um veksling.

- Eg havi verið í Føroyum í sjey ár, og Rafik hevur altíð verið fittur og blíður og hevur hjálpt mær á mangan hátt. Tí skilti eg ikki, at hann skuldi havt hótt okkum báðar eftir lívinum, sigur Muhammed Bourbia.

Hann undirstrikar, at hann hevur ikki verið til staðar sjálvur, tá Rafik Bourbia skal hava framført hesar hóttanir.

### Fer at vitna

Rafik Bourbia sigur, at hann var ovfarin, tá hann varð tikin av løgregluni og gjørdur varðugur við skuldsetingarnar móti sær og bróðurinum. Og hann endurtók tað, sum hann eisini førdi fram í rættinum.

- Eg virði teir sum mínar egnu synir. Og tí skilti eg ongantíð, at teir kundu havt sett hesar ákærurnar fram móti mær, sigur Rafik Bourbia.